# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Andlát & jarðarferðir

**Katrin Guldbro,** Leirvík, búsitandi í Havn, andaðist mikudagin 1. juni, 46 ára gomul. Jarðarferðin varð úr Hebron í Leirvík sunnudagin 5. juni klokkan 14.

**Vilhelmina Joensen** í Kollafirði, andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin 2. juni, 83 ára gomul. Jarðarferðin varð úr Kollafjarðar kirkju manadagin klokkan 14.
Tey, ið vilja minnast Vilhelminu, kunnu lata Eldrasambýlinum í Kollafirði eina gávu, konto í Føroya Sparikassa.

**Hallur Hammershaimb Jacobsen** í Hósvík andaðist hósdagin 2. juni, 25 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Eyvindur Mohr,** Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin 2. juni, 78 ára gamal. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum mánadagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju týsdagin klokkan 13.

**Anna Vang** í Hvalba, andaðist 3. juni, 87 ára gomul. Jarðarferðin varð úr Hvalbiar Missiónshúsið mánadagin klokkan 13.
Tey, ið vilja minnast Onnu, kunnu lata Hvalbiar Missiónshúsi eina gávu.

**Poulina Jacobsen,** á Varpinum í Klaksvík, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fríggjadagin, 77 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi týsdagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni mikudagin klokkan 13:30.

**Damgarð Petersen,** Klaksvík, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum leygardagin, 45 ára gamal. Kistan fer av Leirvík til Klaksvíkar í kvøld klokkan 23 í Kristianskirkjuna. Jarðaferðin verður kunngjørd seinni.

**Andrea Mýlingstind,** ættað úr Tjørnuvík, búsitandi í Havn, andaðist 4. juni á Landssjúkrshúsinum, 73 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum í kvøld klokkan 20. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin klokkan 15. Sungið verður úr sálmabókini.

**Lena Vilhelm** í Vági, fødd Nielsen í Fámjin, andaðist 4. juni á sjúkrahúsinum í Fakse á Sjællandi, 62 ára gomul. Jarðarferðin verður fríggjadagin klokkan 13 úr Hellested kirkju.

*Kelda: Útvarp Føroya*

## Minningarorð um
# Birgir Nónsgjógv



Tá eg mánamorgunin tann 29.11.2004 fekk deyðsboðini av Birgiri, merkti eg beinanvegin á mær sjálvum, at hetta vóru ringastu boð eg nakrantíð hevði fingið.
Vit komu at kennast sum smádreingir norðuri við Gjógv, og hóast tað vóru 2 ár og 1 mánið ímillum okkum, vóru vit nógv saman, kanska einamest av tí, at vit høvdu gittaran og sangin sum felags áhuga, og tað hevði ongin annar í bygdini.
Longu sum smádrongur haldi eg, at Birgir í mangar mátar var øðrvísi en vit aðrir. Eg minnist at í tí eina stórkavanum sum var, gjørdu vit smádreingir ein bý úti í túninum hjá okkum. Vegir vóru gjørdir um alt túnið og tá ið túnið so var fult, var ein langur vegur gjørdur heilt heim í Horn. Birgir var arkitektur og arbeiðsmaður.
Sum oftast gjørdi hann sjálvur tað, hann hevði brúk fyri. Einaferð klipti hann ein gamlan Esso dunk sundur og gjørdi eitt skip burtur úr honum. Eg haldi tað bleiv lodda saman, og helst var hann ikki meir enn 10-12 ára gamal.
Petur Reinert mundi vita, hvat hann gjørdi, tá ið hann bað Birgir koma norður á Norðís at arbeiða. Seinni flutti hann so út í Turkihúsið á Skála og stóð fyri uppbyggingini av Vaðhorn. Har ífrá byrjaði menningin av saltfiskavirkunum í Føroyum. Hann bygdi upp og menti Vaðhorn, sum so seinni varð flutt út á Strendur og tað sama endurtók seg, tá ið flakavirkið Nykur á Toftum bleiv umbygt til eitt saltfiskavirki.
Birgir hevði tað fatanina, at í handverkinum er tað onki, sum ikki ber til. Alt kann gerast betur og tað bleiv eisini gjørt.
Nógvar av teimum nýggju maskinum, sum komu inn á bæði Vaðhorn og Fiskavirking á Toftum vóru skræddar úr skinninum og bygdar upp aftur av nýggjum, tí tær ikki virkaðu nóg væl. Eftir var so bara hjá framleiðaranum at gera tað næstu líka, og tað var í ávísum førum eisini gjørt.
Ofta var tosa um, at virkið burdi verið læst av, so eingin óviðkomandi slapp inn. Men Birgir helt altíð, at ongin fer illa av at hjálpa einum øðrum. Var tað eitt hann ikki dugdi, so var tað at siga nei, um tað so var hansara harðasti kappingarneyti, ja, so fekk hann eisini eina hjálpandi hond.
Sum handverkari var Birgir so mikið væl fyri, tá ið hann fór á tekniska skúla í Havn, at hann var biðin sum avloysari hjá onkrum lærara og har úti gjørdi hann eisini ein ambolt, sum var latin sum gáva frá tekniska skúla í Havn til handilsskúlan, sum tá var nýggjur.
Modellið av Rankanum, sum nú stendur á kommunuskrivstovuni á Tvøroyri telist eisini millum perlurnar í føroyskum handverki.
Saknurin eftir Birgir er stórur hjá øllum teimum, sum hava havt nakað við hann at gjørt. Hann var ein persónur, sum tú altíð kundi koma til og ráðføra teg við og var skjótt innaliga í øllum tí, sum fyrifórst.
Hjá tykkum nærmastu, tær Elisabeth og børnum, bæði innan Glyvur og við Norðskála, hjá foreldrum og syskjum, eru dagarnir tungir og tað kann verða ringt at skilja, hví Várharra hevði fyri neyðini at taka hann heim júst nú, men helst ein dag, fáa vit eisini tað at vita. Má Jesus pápi verða hjá tykkum fram yvir og styrkja tykkum. Við hesum fáu fátæku orðum, vil eg lýsa frið yvir minni um mín vin, Birgir Nónsgjógv.

**Jónsvein**

**Dagurin**

**7. juni. Jeremias.** Ein av teimum fýra stóru profetunum í Gamla Testamenti. Í Føroyum hevur navnið Geramíggjas verið brúkt.
Bíbilska navnið merkir tann av Guði upphevjaði.

## Ræting

Viðvíkjandi greinini »Hendingar til skips í Grønlandi og Íslandi« (Vikuskiftið 4.-5. juni 2005 síða 33) stóð í myndatekstinum at fyritøkan J. Dahl Gørðum í Vági átti skonnartina Borgina TG777, hetta er ikki rætt. Thorvald Hjelm í Vági átti Borgina og var sjálvur skipari.

†

Elskaði maður mín, góði pápi, verpápi og abbi okkara

**Eyvindur Mohr**

andaðist hósdagin 2. juni.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
týsdagin 7. juni kl. 13.00.

**Nina, Turið og Gunnvør**

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við